# Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum: www.sosialurin.fo

## Gudrid tapti lokaluppgerð

*Flogbóltur: Sum vit nevndu í týsdagsblaðnum, spældu kvinnurnar Fortuna Odense móti DHG týskvøldið, men úrslitið var einki at reypa av. Tær taptu greitt 2-0*

Sveinur Tróndarson

Endaumfarið í donsku flogbóltslandskappingini er byrjað og í løtuni spæla liðini ímóti hvørjum øðrum fyri at finna fram til, hvørji lið skulu hittast í hálvfinalunum. Tí hava dystirnir ikki stórvegis upp á seg, men teir skulu kortini spælast.

**Eingin ivi um sigurin**

Týskvøldið spældu Gudrid Nolsøe og hinar Fortuna-kvinnurnar lokaluppgerð móti hinum Odense liðnum í meistaradeildini hjá kvinnum, DHG.

FHG hevur staðið seg væl í ár, og hevur ligið á odda í kappingini meginpartin av tíðini. Fyri stuttum vóru tær í steypafinaluni, men har varð úrslitið ikki sum tær høvdu ynskt. Tær taptu móti Holte, sum annars liggur aftanfyri DHG í stigatalvuni.

Tí var lagt upp til ein spennandi dyst millum DHG og Fortuna týskvøldið, men tann spenningurin kom ongantíð. DHG var bara betri enn Fortuna tann dagin og tískil var ongantíð ivi um hvønn veg sigurin fór.

**Nógv mistøk**

Sum vit hava skilt, var dysturin ikki tann, sum verður skrivaður um í søgubókunum. Nógv mistøk vórðu gjørt av báðum liðum, og tað var skilligt, at liðini vóru fjáltursstungin. Ikki var tað neyðugt, tí ógvuliga lítið var at spæla um.

Tað var oddaliðið, sum fyrst fekk tamarhald á nervunum og fekk skil á spælinum. Tær fingu skipað spæl sítt betri enn Fortuna, sum ongantíð rættuliga fekk skil á sínum spæli.

Tí endaði dysturin við greiðum sigri til DHG. Sum nevnt hevur dysturin ikki stórvegis týdning, tí øll fýra liðini, sum eru við í endaspælinum, skulu spæla hálvfinalur. Um nakrar dagar verður funnið út av hvør skal spæla móti hvørjum og tá tað er avgjørt, verða hesir dystirnir gloymdir.

## Taptu við sjálvmáli

*Bæði Jens Martin Knudsen og Jens Kristian Hansen leiktu allar 90 minuttirnar, tá Ayr United á heimavølli tapti 1-0 móti Livingston*

Jákup Mørk

Fyri fyrstu ferð vóru teir báðir føroysku landsliðsleikararnir á liðnum hjá Ayr United, men hetta munaði tó lítið, tá saman um kom.

Føroyska liðið mátti á heimavølli taka til takkar við einum 1-0 tapi móti Livingston, sum er millum liðini, sum stríðast um uppflytingarsessirnar.

Málið, sum var eitt sjálvmál, kom eftir, at Jens Martin ikki megnaði at halda einum innleggið. Tíverri datt bólturin niður á verjuleikaran, David Craig, haðani hann endaði í málinum.

Sum skilst, leikti Jens Martin annars ein góðan dyst, og millum annað verður sagt frá, at hann hevði eina frálíka bjarging tá góður hálvur tími var leiktur.

Í hesum døgum verður annars tingast um, hvørt teir báðir føroyingarnir skulu halda fram í skotska felagnum, eftir at leigumál teirra renna út. Meira verður helst at frætta um hetta í næstum.



*Føroyski landsliðsmálverjin, Jens Martin Knudsen, var endiliga at síggja í Ayr-málinum*

# Donsk/hollendsk sensatión í Rom

*Danski landsliðsleikarin, Jon Dal Thomasson, syrgdi fyri mest óvæntaða úrslitinum týskvøldið, tá hann skeyt bæði málini hjá Feyenoord móti Lazio*

Jákup Mørk

Fýra dystir í seinna bólkaspælinum í UEFA Champions League vórðu leiktir týskvøldið, og meðan favorittarnir enn liggja greitt á odda í bólki C, er bólkur D nú fullkomuliga opin.



*Danski landsliðsleikarin, Jon Dal Thomasson fegnast um sigursmálið hjá Feyenoord í dystinum móti Lazio*

**Bólkur C: Søguligur týskur sigur**

Stórdystur millum tvey av mætastu liðunum í Europa var á skránni, tá Real Madrid á heimavølli tók ímóti Bayern München. Undan dystinum hevði kongaliga spanska felagið ongantíð tapt á heimavølli fyri týskum liði, men hetta meti stóð longu til at falla eftir fyrstu 25 minuttirnar.

Tá høvdu týskararnir longu lagt seg á odda við málum frá Mehmet Scholl og Stefan Effenberg, men tá Morientes løtu seinni minkaði um munin, hildu spaniólarnir vónina við líka.

Móti endanum av fyrra hálvleiki økti brasiliumaðurin, Elber, til 3-1, og hóast Raul minkaði um munin í seinna hálvleiki, so kundi týsku meistararnir sláa sigurin fastan, tá Paulo Sergio skeyt seinasta málið í dystinum.

Eftir dystin var týski venjarin, Ottmar Hitzfeld, sum vera man ovurfegin. - Sigur okkara var fyrst og fremst orsakaður av álopsspælið okkara, helt týski venjarin fyri, og legði samstundis afturat, at hann nú var sannførdur um, at tað fór at eydnast tapandi finalistunum frá undanfarnu kapping at leika seg fram til fjórðingsfinalurnar.

Hóast norska Rosenborg hevði meginpartin av spælinum allan seinna hálvleik, so máttu teir lúta fyri Dynamo Kiev, sum vann sær ein 2-1 sigur á heimavølli.

Longu eftir 29 minuttum hevði ukrainska liðið vunnið sær eina tvey mála leiðslu við málum frá Alexander Khatskevich og Serhiy Rebrov, og móti endanum av fyrra hálvleiki kundi teir økt enn meira um leiðsluna, men Georgi Demetradze var óheppin, tá hann sendi bóltin á stongina.

Í seinna hálvleiki minkaði Jan Ivar Jakobsen um munin, og síðani legði Rosenborg stórt trýst á mótstøðuliðið. Mál komu tó eingi, tað sum eftir var av dystinum, hóast norska liðið einar tvær ferðir hevði risa stórar møguleikar.

Norska liðið hevur nú mest sum útspælt sín leiklut í bólkaspælinum. Nú helmingurin av dystunum eru leiktir, eru teir niðast við einum stigi. Bayern München er á odda við sjey stigum, Real Madrid hevur seks stig, og Dynamo Kiev hevur á triðja plássinum trý stig.

**Bólkur D Dani syrgdi fyri sensatiónini**

Franska Marseille, sum einki stig hevði fingið burtur úr teimum báðum fyrstu dystunum, megnaði at vinna sær trý týdningarmikil stig, tá teir á heimavøllil vunnu 1-0 á enska (ella europeiska) Chelsea.

Avgerandi málið kom eftir einans 16 minuttum, tá Robert Pires úr sera spískum vinkli, sendi bóltin fram við Ed de Goey í Chelsea málinum.

Marseille hevði tó fleiri møguleikar at økja um leiðsluna, tí enska verjan, sum var mannað við heimsmeistarunum, Desailly og Leboeuf, var alt annað enn væl skipað.

Venjarin hjá enska liðnum, Gianluca Vialli, fekk ikki gjørt stórvegis fyri at forða fronsku yvirvágini, tá hann var staddur á áskoðaraplássinum, orsaka av banninum hann fekk eftir útidystin móti Lazio. Hann mundi tó iðra seg, tá Tore Andre Flo í seinasta minuttinum av dystinum fekk ein risa møguleika, men frálíki stútari hansara, varð møttur av eini eins frálíkari bjarging frá Trevisan í franska málinum.

Í hinum dystinum í bólki D, megnaði hollendska Feyenoord at skapa mest óvæntaða úrslitið týskvøldið, tá teir á útivølli vunnu 2-1 á italska Lazio.

Fyrsta góða tíman var tó lítið, ið bendi á, at so skuldi verða, tí eftir at argentiski landsliðsmiðvallarin, Veron, eftir 37 minuttum hevði lagt italska stórfelagið á odda, var líkt til at heimaliðið hevði fult tamarhald á støðuni.

Mancini kundi eisini økt um leiðsluna, men skot hansara rakti stongina, og ísataðin kundi danski landsliðsleikarin gera sær dælt av sløsutum verjuspæli, tá hann tvær ferðir innan seinasta korterið legði bóltin í málið.

Við ósigrinum leygardagin misti italska liðið søguliga møguleikan at røkka metinum hjá Ajax, sum megnaði at leika 19 dystir í europeiskum høpi uttan at tapa. Undan dystinum týskvøldið, hevði Lazio ikki tapt í 18 dystum, men í 19. dystinum gekk tað so galið.

Óvæntaðu úrslitini týskvøldið høvdu við sær, at bólkur D nú er púra opin. Feyenoord, sum akkurát megnaði at leika seg fram til seinna bólkaspælið, er nú á odda við seks stigum, meðan favorittarnir báðir, Chelsea og Lazio, hava fýra stig hvør. Á fjórða plássinum er Marseille við trimum stigum.



# Flogbóltskapping á Giljanesi

*Leygardagin skipaði flogbóltsfelagið, Dráttur, fyri flogbóltskapping á Giljanesi. Kappingin varð fyri yngru deildirnar, og høvdu ikki færri enn 62 lið boðað frá luttøku. Kappast varð í 10 aldursbólkum, og gjørdust sørvingar stóru vinnararnir, tí teir vunnu ikki færri enn seks av kappingunum.*

*Niðanfyri eru myndirnar av vinnandi liðunum prentaðar, men tíverri hevur tað ikki eydnast okkum at fá mynd av gentur 14 hjá TB, sum vunnu sín aldursbólk.*



*Gentur 9, SÍa. Á myndini er eisini SÍb, sum gjørdist nr. 2. Á myndini síggjast bæði liðini*



*Dreingir 9, SÍ: Ragnar, Meinar, Finn, Ingi, Bárður, Tórur og Jákup*



*Vinnari fyri gentur 12 varð KÍFa. Tær eru Durita, Ella, Anja, Ella, Anja, Gunnleyg, Heidi, Lisbeth, Hansy og Rina*



*SÍ vann bólkin fyri dreingir 12 ár. Á vinnandi liðnum eru tað Bjarni, Janus, Ingi, Per og Elias*



*Eisini hjá 14 ára gomlu dreingjunum gjørdist SÍ vinnari. Her var manningin Kári, Dánjal, Ragnar, Jákup, Jóan Petur og Árni*



*Kollfirðingar eru væl fyri á kvinnusíðuni, og vunnu tær eisini gentur 16. Tær eru Eileen, Maiken, Svanhild, Heidi, Angelie og Ena*



*Hjá Dreingjum 16 ár gjørdist tað SÍ, sum fór avstað við gulmerkjunum, og vóru teir Petur, Jóhan, Petur, Jón, Brian, Hans Kári, Ásbjørn og Ólav*



*Hjá kvinnuunglingum gjørdist TB vinnari, og hesum tvøráliðnum eydnaðist okkum at fáa mynd av. Durita, Annikka, Anja, Linda, Marit, Songa og Maria*



*Sørvingar megnaðu eisini at vinna deildina hjá mansunglingum, men tíverri hevur tað ikki eydnast okkum at fáa nøvnini hjá leikarunum at vita*